# Ársaðalfundur

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í Suðuroyar Sparikassa P/F mikudagin 16. apríl kl. 19.00 í VB-húsinum, Vágur.

Lýsing

**Dagsskrá:**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum.
   Nevndin mælir til, at 2 mió. kr. verða útgoldnar í vinningsbýti .
4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunnsins at tilnevna ein nevndarlim sambært §14.
   Suðuroyargrunnurin hevur boðað frá, at hann fer at tilnevna Malfriður Danberg aftur sum nevndarlim.
5. Val av nevndarlimi.
   Óli holm stendur fyri vali sambært §14, stk. 2 og §21, stk. 4 í viðtøkunum.
6. Val av grannskoðan.
   Nevndin mælir til afturval av verandi grannskoðara Rasmussen & Weihe P/F statsaut. grannskoðarafelag.
7. Møgulig uppskot frá nevnd ella partaeigarum.
8. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu felagsins í Vági.

Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fulltrúir og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi fríggadagin 11. apríl 2008 hava biðið um atgongumerki á deildum felagsins í Vági, á Tvøroyri ella í Tórshavn.

Vágur, tann 2. apríl 2008
Nevndin

SUÐUROYAR SPARIKASSI



Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Økisleiðari til Suðurstreymoy - Øki 1

**Stuðulstænastan søkir eftir økisleiðara til øki 1, íð umfatar Suðurstreymoy**

Stuðulstænastan er í støðugari menning, og sum liður í einum nýggjum leiðslubygnað skal ein økisleiðari setast. Starvið er eitt nýtt fulltíðarstarv og verður sett 01.06.2008.

**Stuðulstænastan fevnur um Stuðulstænastuna og Deildina fyri sinnisveik.**

- Uppgávunar hjá Stuðulstænastuni eru fylgi, eftiransni, umsorgan og sosialpedagogisk hjálp til heimabúgvandi persónar yvur 18 ár við serligum tørvi, sum eru rørslutarnaðir ella hava avmarkaðan sálarligan førleika. Í løtuni fáa uml. 110 persónar stuðul.
- Uppgávunar hjá Deildini fyri sinnisveik eru bústaðar- og virknistilboð til sinnisveik. Høvuðsendamálið er at stuðla persónum, so teir hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

**Førleikakrøv og høvuðsuppgávur**

- Tú hevur eina relevanta sosial- ella heilsufakliga bakgrund.
- Tú hevur fíggjarligu og fyrisitingarligu leiðsluna av starvsfólki, íð eru sett í øki 1.
- Tú skipar fyri menning av starvsfólki í øki 1.
- Tú kanst byggja víðari uppá tað fakliga fundamentið í tøttum samstarvi við starvsfólkini.
- Tú dugir at fyrireika og menna tænastuna til borgaran.
- Tú dugir at samstarva við økisleiðaranar í økistoyminum innan Nærverkið.
- Tú skipar fyri ígongdsetan og uppfylging av strategiskum málum.

**Vit leita eftur einum økisleiðara, sum hevur hesar persónligir eginleikar**

- Tú ert málsøkjandi og framsøkin.
- Tú arbeiðir sjálvstøðugt og dugir væl at fyrisita.
- Tú dugir væl at samskifta, bæði munnliga og skrivliga.
- Tú dugir væl at samstarva.
- Tú ert týðuligur og torir at taka avgerðir.

**Vit bjóða**
Eitt arbeiðspláss í støðugari menning og við nógvum avbjóðingum. Humor og supervisión.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Nærverkið og deildir undir tí. Nærverkið hevur sent starvið til flokkingar.
Tann, íð settur verður má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú venda tær til Regin Johansen, leiðara, á telefon 360000.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum og CV skal sendast til:

Nærverkið
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Regin Johansen, leiðari fyri Stuðulstænastuna

**Umsóknarfreist: 21. apríl 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



## Linieskolen

*– den moderne husholdnings- og håndarbejdsskole*



- Kost og ernæring
- Børn og pædagogik
- Idræt og sundhed
- Kreativitet og design

*Fællesskab og venner for livet!*

***Smag på livet!***
Vi satser på at give dig større faglighed, selvværd og personlig ballast.

**www.linieskolen.dk**
Østergade 77, 8370 Hadsten, +45 86 98 01 45



## Sigling M/F Smyril Dýra biðidag

| Dýra biðidag | Sum sunnudag |
|---|---|
| Leygardagin 19/04-08 | Sum sunnudag |

Leygardagin,19/04-08, koyra bygdaleiðir í Suðuroy sum sunnudag

STRANDFARASKIP LANDSINS